# Bjargafuglur í Skúvoy 2010

Bergur Olsen, Havstovan

Hildið varð fram við kanningum av sjófuglinum í Skúvoynni sum higartil. Endamálið er at fáa langar tíðarseriur fyri støðuna hjá sjófuglinum, so hesar tíðarseriur kunnu samanberast við broytingar í veðurlagnum og tilfeinginum í havinum. Hesi úrslit kunnu m.a. siga nakað um broytingar í lívfrøðiliga margfeldinum, og hvør orsøkin er til broytingarnar, t.d. um tær eru ávirkaðar av veðurlagsbroytingum. Úrslit frá Høvdanum í Skúvoynni vórðu brúkt sum dømi um ávirkan av veðurlagsbroytingum í bóklinginum “Signs of Climate Change in Nordic Nature” (Tema Nord 2009:55).



Høvdin á Skúvoynni

Í Høvdanum eru um 300 røkur og spíldir við lomviga, og lomvigin er taldur á hvørjari spíld sær eina ferð um árið síðani 1972 (1975 undantikið). Síðani 1988 er skrásett, hvussu nógvar ritupisur eru komnar undan fyri hvørt reiður, og síðani 2001 eru ritureiðrini eisini skrásett. Havhesturin og havhestareiðrini eru skrásett síðani 2001 og kannað er, hvussu nógvir ungar eru komnir undan á hvørjum ári. Tvey sjálvirkandi fototól hava tikið myndir av Høvdanum alt summarið síðani 1978.

Í Byrgisbakka, sum er stutt norðan fyri bygdina, er lundin kannaður í 1991 til 1995. Í 2005 vórðu hesar kanningar tiknar upp aftur, við sjálvvirkandi videoupptøkum. Kannað verður nær lundarnir koma, nær teir verpa, hvussu nógvir verpa, hvussu nógvar pisur koman út, hvat pisurnar fáa at eta, hvussu nógv tær fáa og hvussu nógvar verða floygdar. Ætlanin er at hesar upptøkur kunnu síggjast beinleiðis á internetinum.




Lomvigi í Høvdanum á Skúvoynni frá 1972-2010. Lomvigin hevur verið taldur í Høvdanum síðani 1972 (1975 undantikið) og sum sæst á mynd 1, so var ein stór minking til 1990, men síðani hevur hann ment seg eitt sindur aftur.




Myndin vísir hvussu nógvir rituungar eru komnir undan fyri hvørt reiður í Høvdanum á Skúvoynni síðani 1982. Ongar teljingar eru frá 1983-1985 og í 1987. Sum sæst, hava tað verið sera stór sveiggj í, hvussu nógv er komið undan, og støðan er versnað seinastu árini. Ein lítil glotti var í 2009, men í 2010 kom ongin pisa undan.

**Húsið Norðuri á Dal**

Í 2001 varð eitt lítið hús sett upp Norðuri á Dal, so til ber at kika út í Høvdan úr húsinum. Hetta hevur gjørt tað lættari at telja lomvigan og eisini gjørt tað møguligt at fara undir neyvari teljingar av ritunum og havhestunum í øllum Høvdanum.




Talið av ritureiðrum og floygdum rituungum í Høvdanum frá 2001 til 2010. Aftan á 5 ár, har ongin ungi varð floygdur, komu 2.560 rituungar undan í 2009, men í 2010 var aftur galið.






Talið á havhesti, reiðrum og floygdum havhestaungum frá 2001-2010. Talið hevur verið rættiliga støðugt, hóast 2007 royndist illa. Síðani hevur tað verið ein framgongd og hóast talið av havhesti og reiðrum minkaði í 2010, so vaks talið av ungum.



**Sjálvvirkandi fototól**
Á Dalinum standa tvey sjálvvirkandi fototól, sum taka myndir av tveimum pørtum av Høvdanum hvønn dag alt summarið. Hetta hevur verið gjørt síðani 1978 við vanligum svart hvítum filmi. Í 2008 var ta eina fototólið skift út við eitt talgilt tól, og í 2010 varð hitt tólið skift út. Myndagóðskan er munandi betur við hesum nýggju tólunum, og tey kunnu eisini standa í longri tíð uttan røkt.



Ein mynd varð tikin hvønn tíma av hesum økinum ígjøgnum alt summarið, so her ber til at síggja, hvussu gekst við lomviganum og ritunum alt summarið.

**Lundakanningar**

Í Byrgisbakka, sum er stutt norðan fyri bygdina, stendur ein telda, sum goymur videomyndir, sum verða tiknar inni í og uttan fyri lundaholurnar, frá tí at lundin kemur seinast í apríl, til teir seinastu fara fyrst í septembur. Hesar upptøkur eru sera áhugaverdar, og nógvar upplýsingar kunnu fáast burtur úr.



Byrgisbakki í Skúvoy. Skílið við telduni sæst til vinstru í myndini.




Kannað verður, nær lundarnir verpa, hvussu nógvir verpa, hvussu nógvar pisur koma út, hvat pisurnar fáa at eta, hvussu nógv tær fáa og hvussu nógvar verða floygdar. Treytin er tó, at peningur er til fólk at viðgera upptøkurnar, men tað hava vit ikki í løtuni, so upptøkurnar verða goymdar fyribils. Bert fáir lundar vurpu í 2010 og allir rímdu av eggunum, so ongar pisur komu út.

Sildberi kemur við føði til pisuna í 2005. Í 2010 sást ongin sildberi.